# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
POST@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*Annars eigur Fiskirannsóknarstovan við sínum dugnaligu fólkum tøkk fyri tað stig tey hava tikið: at fáa fleiri av heimsins fremstu granskarum á økinum til Føroya*

*oddagreinin*

## Okkara ábyrgd

Tað gerst alt meira greitt, at virksemi menniskjans ávirkar veðurlagið á jørðini. Veðurlagið ávirkar so aftur alt umhvørvi okkara, allar okkara kringumstøður og lívskor. Fáur man í dag ditta sær at avnokta globalu upphitingina. Vakstrarhúsárinið er ein beiskur veruleiki, sum allar tjóðir eru noyddar at fyrihalda seg til. Tað ber heilt einfalt ikki longur til at látast sum einki ella at gera sum strutsurin at stinga høvdið í sandin, tá hann merkir at vandi er á ferð. Vandin hvørvur ikki fyri tí, at vit látast ikki at síggja hann.

Ráðstevna, sum júst hevur verið í Føroyum um veðurlagsbroytingar, hevur enn einaferð avdúkað, at vakstrarhúsárinið ávirkar okkara lívskor. Tess heitari jørðin gerst, tess størri er ávirkanin eitt nú á teir havstreymar, sum eiga lívið í okkum føroyingum. Hesin veruleiki avdúkar, at eingin kann krógva seg burtur og eingin sleppur undan áríninum. Sjálvt eitt lítið land sum Føroyar, sum liggur so frítt fyri í Norðuratlanshavi verður ávirkað av vakstrarhúsáríninum.

Alt hetta merkir, at vit nú mugu taka okkara ábyrgd. Hetta merkir, at vit mugu viðurkenna okkum Kyoto sáttmálan, sum áleggur teimum londum, ið hava samtykt henda sáttmála at minka um útlátið av vakstrarhúsgassum. At minka um hetta sera skaðiliga útlát er einasta farleið burtur úr tí vanda, sum útlátið er fyri mannaættina. Tøknin er nú so framkomin, at okkum nýtist ikki at óttast búskaparlig afturstig fyri tí, um vit fara undir at minka um útlátið. Kanska merkir ein minking av føroyskum útláti ikki tað stóra í altjóða høpi. Men hetta er tó okkara ábyrgd og hetta hevur tí ein stóran moralskan týding og eigur tí at verða gjørt. Avvarandi myndugleikar mugu nú taka sær um reiggj og fáa neyðugu lógarkarmarnar til vega.

Annars eigur Fiskirannsóknarstovan við sínum dugnaligu fólkum tøkk fyri tað stig tey hava tikið: at fáa fleiri av heimsins fremstu granskarum á økinum til Føroya. At hesi møta so fjølment upp man eisini vera tí, at okkara góðu høvd á hesum granskingarøkinum hava gjørt og gera eitt gott arbeiði. Vónandi kunnu vit fjølmiðlar eisini taka í egnan barm og kunna meira um hesi álvarsmáls, eitt nú eisini í sambandi við eina møguliga komandi oljuvinnu.

**Sosialurin**

## Nútíðin verður ikki vakrari av at reingja fortíðina



*- Politikararnir vistu, hvat teir skuldu taka sær av – skaffa pengar og samtykkja ferðaætlan. Við øðrum orðum at seta mál og leggja karmar, skrivar Thomas Arabo í viðmerking til Reidar Nóngjall. Myndin er tikin á Tvøroyri, tá gamli Smyril á fyrsta sinni kom til Føroya í 1975. Tá var fiskimannaverkfall, og Smyril slapp ikki at bryggju á Tvøroyri*
*Mynd: Árið ið fór 1975*

**THOMAS ARABO**



**Gamalt er, at sjálvrós stinkar. Kom av onkrari orsøk at hugsa um hetta, tá eg las viðtalið við Reidar Nónfjall handilsskúlastjóra í Sosialinum 5. juli um byggingina av okkara nýggja snøgga ferðamannaskipi Smyrli**

Aftan á eina svadu um, hvussu væl alt var planlagt - ein fær næstan ta fatan, at eitt ára seinkingin av Smyrli eisini var planløgd – so kemur hetta brotið:

*»Áður var tað gjarna so, at tosað varð um at keypa skip. Síðani fóru politikarar – kanska við einum embætismanni – at hyggja at eitt nú einum gomlum Morten Mols, sum so varð keypt til endamálið.«*

Hettar er eitt sera niður-gerandi úttalilsi m. a. um teir politikarar, sum ráddu fyri borgum, tá ið »Molsurin« kom. Av tí at tveir av oddamonnunum ikki eru meira okkara ímillum, er nokk rætt at koma við hesari viðmerking.

Keypið av Mortan Mols í 1975 var ein partur av einum stórum samferðslupolitiskum frambroti, ið umfataði bæði samferðslu innanð og uttanlands. Høvuðsmenninir aftan fyri hetta frambrot vóru Finnbogi Ísakson, sáli, Atli Dam, sáli og Jógvan Sundstein. Teir blandaðu seg ongantíð upp í nakað tekniskt, og eingin av teimum var umborð á skipinum, áðrenn tað var keypt. Hinvegin so gjørdi starvsfólkið á Strandferðsluni, høgur sum lágur, eitt megnararbeiði. Tey fingu 9 vikur og 3 milliónir at umbyggja skipið fyri. Eingir dýrir konsulentar – alt uttan sjálvt skipasmiðjuarbeiðið var eginframleiðsla. Seinking: 1 vika.

Politikararnir vistu, hvat teir skuldu taka sær av – skaffa pengar og samtykkja ferðaætlan. Við øðrum orðum at seta mál og leggja karmar.

Sum eitt kuriosum kann nevnast, at Mortan Mols typan var ein skipatypa, sum var ment av Knud E. Hansen, og blivu eini 60 – 70 skip av somu typuni bygd í 60'unum. Hesi skip síggjast enn í nógvum útlendskum ferjuhavnum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.